VIÐMERKINGAR

Fólkaskúlin og frískúlin

Annita á Fríðriksmørk

Sjúrður Skaale og Else Birgitte Petersen
Sjúrður Skaale skrivar eina oddagrein í Fregnum 7. februar um frískúlar.

Else Birgitte Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag svarar honum aftur í Dimmalætting fríggjadagin 14. februar.

Hon spyr m.a., hvørji hesi "vit" eru, sum Sjúrður skrivar um. Hon skrivar ikki sørt niðurlátandi: *"Hvørji eru vit? Eru tað tey, sum tú ert samsintur við? Er tað innara kjarnin í Tjóðveldisflokkinum, tey, sum seta út í kortið?"*

Til tað kann eg svara, at Sjúrður er ein vanligur limur í Tjóðveldisflokkinum, sum skrivar eina oddagrein um frískúlar fyri eitt blað, sum er eitt fullveldisblað og ikki eitt blað hjá Tjóðveldisflokkinum.

Á Fregnum starvast mær vitandi, fólkafloksfólk, javnaðarfólk og tjóðveldisfólk, hesi hava eitt felags áhugamál, og tað er fullveldi.

Tað er alt í lagi, at forkvinnan fyri Lærarafelagið gevur eini oddagrein, sum henni í Fregnum, svar uppá tiltalu. Men tað harmar meg, at Tjóðveldisflokkurin verður blandaður uppí.

Um Else Birgitte Petersen er áhuga í at vita, hvat *Tjóðveldisflokkurin* sum flokkur sigur um frískúlar – eisini sæð í mun til fólkaskúlan, so varð tað m.a. ført fram í framsøgurøðu mínari, sum eg helt vegna Tjóðveldisflokkin á tingi týsdagin, tá ið frískúlar vóru fyri.

Niðanfyri er nakað av tí, sum undirritaða førdi fram vegna flokkin á tingið.

Skotgrøvir
Tá tosið fellur inn á frískúlar, hevur tað í longri tíð verið ein viðgerð, sum er merkt av skotgrovum, har annar liggur í eini grøv og heldur uppá, at neyðugt er við frískúlum so vit fáa kapping. Meðan hin grøvin roynir at halda aftur, og sigur seg verða ímóti, at tað almenna skal rinda fyri snobbarnar, sum vilja marka seg við at ganga á privatskúla. Og við, at vit heldur eiga at betra fólkaskúlan enn loyva frískúlum.

Men so einfalt er hetta kortini ikki.

Innihaldið í einum frískúla
Fyri tað fyrsta fært tú ikki ein varandi frískúla bara tí tú ert ímóti fólkaskúlanum, tað eigur hinvegin at verða eitt námsfrøðiligt og fakligt alternativ til fólkaskúlan. Har skúlin t.d. leggur dent á
- ikki at hava undirvísingina býtta í lærugreinir,
- har skúladagurin ikki er býttur í tímar,
- har flokkarnir ikki eru býttir eftir aldrinum á næmingunum,
- onkur vil kanska hava ein frískúla við heilt øðrum lærugreinum enn teimum, sum eru í fólkaskúlanum,
- ella at lærugreinirnar koma á øðrum aldursstigi enn í fólkaskúlanum,
- og har innihaldið er heilt øðrvísi enn í fólkaskúlanum.

Ikki ein spurningur um antin ella men um bæði
Til grundgevingina um, at vit heldur eiga at betra fólkaskúlan enn loyva frískúlum, vil eg siga, at hatta er ikki ein spurningur um antin ella, men ein spurningur um bæði. Og so kann nevnast, at hendan samgongan hevur lagt til brots við tí røttu mannagongdini. Fólkaskúlin er raðfestur hægri enn nakrantíð, og sleppur hendan leiðin at halda fram eftir 30. apríl, sum hendan samgongan hevur slóðað fyri, so eru vit á rættari kós.

Um nakar skuldi ivast so er játtanin til fólkaskúlan økt við 56 milliónum og tað man verða prosentvíst størsta hækkanin, sum nakrantíð er givin.

Fólkaskúlanum tørvar ábøtur
Men tað er framvegis stórar ábøtur fyri neyðuni, t.d. at lata upp fyri lægri næmingatalið í flokkunum, at betra umstøðurnar hjá fólkið við breki, at bøta um undirvísingartilfarið osfr osfr.

Marknasteinar í skúlasøguni
AT loyva frískúlum í Føroyum er at flyta mørk. Og í skúlasøgu Føroya er við jøvnum millumbilum flutt mørk: einaferð var skúlin fyri dreingir, einaferð var føroyskt ikki loyvt, einaferð var realskúlin osfr osfr Hetta vísir, at sum tíðir líða so seta tær dynamisku bylgjurnar innaní okkum menniskju nýggj krøv. Ongin mannaskapt skipan sleppur at verða ævigt galdandi, har vilja altið fyri summi verða karmar, sum tykjast ov trongir. Meðan hesir somu karmar fyri onnur vilja verða einasti realistiskt hugsandi møguleiki.

Soleiðis er eisini við fólkaskúlanum. Fólkaskúlin, sum er fyri øll, er ein góður skúli. Tá hugsað verður um allar aktørarnar sum eru innvolveraðar í føroyska fólkaskúlanum: næmingar, lærarar, leiðslur, foreldur, skúlastýri, mentamálastýri, politikarar og føroya Lærarafelag, ialt fleiri 1000 fólk. So haldi eg, at vit kunnu ikki annað enn vera fegin um, at úrslitið er so gott sum tað er. Men, at har krevjast ábøtur ivist eg onga løtu í, og tað vilja tað altið koma at gera.

Rímiligur tørvur
Sjálvsagt skal tað verða ein rímiligur tørvur á einum frískúla, áðrenn tað almenna fer at loyva skúlanum, og áðrenn tað almenna fer inn við figging. Men hvat er so ein rímiligur tørvur?

Vit vita, at allir fólkaskúlar í Havnini eru mannaðir við flokkum har 24-26 næmingar sita. Skulu vit nú til at mannað frískúlaflokkar, har næmingatalið er ein helvt av tí, sum vit krevja í fólkaskúlanum, so vil næmingatalið í sær sjálvum verða eggjandi og tiltrekkjandi fyri bæði næmingar, foreldur og lærarar.

Tað er altso ikki tað sama at ganga í einum ella undirvísa einum skúlaflokki við 12-14 næmingum, sum tað er at ganga í ella undirvísa einum flokki við 24-26 næmingum. Um ein frískúlalóg verður viðtikin, mugu vit ansa eftir at lága næmingatalið ikki er drívmegin aftanfyri 85% alment figgjaða frískúlan, men burturav fakliga innihaldið ella námsfrøðiliga mannagongdin.

Álitið leggur upp til, at *"ein friskúli við rætti til studning skal hava minst 12 næmingar fyrsta árið, og at næmingatali eftir 3 árum skal verða komið upp á minst 28 næmingar"*. Men hvussu nógvir lærarar eru knýttir at hesum næmingatalið síggi eg ongastaðni, men man tað tó verða avgerandi fyri kostnaðin av at reka ein slíkan skúla. Roknað um til fólkaskúlakrøv minus foreldragjaldið, so vildi eg skotið eitt tal uppá 1_ lærara.

Hvat leggur ein frískúli dent á
Í einum frískúla verður størri dentur lagdur á ávís øki ella ávísar lærugreinir, enn tað verður í fólkaskúlanum, t.d. vil ein frískúli upplagt leggja dent á handaligar lærugreinir, teldutøkni, fremmand mál, list, tónleik, umhvørvi o.l.

Hvussu næmingar skulu verða í einum flokki
Men táið tað er sagt, so eigur kravda næmingatalið til frískúlan altso at verða á leið tað sama, sum kravda næmingatalið til ein fólkaskúla.

Nú sigur onkur kanska, at longu har køvi eg allar møguleikar fyri frískúlum, men um so er, so eiga vit eisini at hugsa um avleiðingarnar av at krevja, at næmingatalið við ársbyrjan í einum *fólkaskúla* -skal í mesta lagi verða 24.

Og leggjast so næmingar afturat gjøgnum árið, so endar tað talið ofta uppi á eini 28 næmingum. Og tað í sær sjálvum køvir námsfrøðiligum og fakligum møguleikum í fólkaskúlanum.

Kann verða at kravda næmingatalið til ein frískúla eigur at verða nakað lægri enn til ein fólkaskúla, sum kompensatión fyri, at foreldrini rinda sín part. Men munurin sum nú fyriliggur í uppskoti haldi eg er í størra lagi, og sum ger, at fólkaskúlin verður fyri mismuni, - og tað kann ikki verða meiningin.

Haraftur eigur at verða undirstrika tann týdning tað hevur at fáa broytt fólkaskúlalógina aftur soleiðis, at gingið verður burtur frá møguleikanum at loyva fleiri enn 24 næmingum í ein flokk.

Meira um frískúlar kemur í eini seinni grein.

3. - 5. mai í Ítróttarhøllini í Runavík

Bústevnan
Hús & Innbúgv



Staðið har:

Bygging - Umbygging
Havaarbeiði - Umvæling
Køkar - Vindeygu
Hurðar - Fígging
Trygging - VHS
Hvítvørur - Møblar...

...og øll sum hava við hús & innbúgv at gera, hava møguleika at stilla út.

Lat ikki henda møguleikan gleppa tær av hondum. Ver við á bústevnuni Hús & Innbúgv.

Setið tykkum í samband við okkum!

HÚS & INNBÚGV

Sosialurin i Sosialurin

(Annar partur)

Gestsins eyga, blátt?

Rolf Guttesen
19.02.02

Munnu fólkafloksmenn og aðrir sum elska konspiratión-steoriina – at danskarar leggja ráð saman at yvirtaka føroyska vinnulívið – munnu teir í teirra pietetsfulla sinni hava gloymt, at hetta er ikki fyrstu ferð at føroyskir myndugleikar, Landsstýrið og Løgting, hava biðið um peningaliga hjálp tá samanbrot og fallitt varð hóttandi. Og hvørja ferð, ið á stóð, hava teir fingið hjálp frá bróðurhond!!

Men veruleiki er eisini, at hvørja ferð umbiðin hjálp er fingin, so hava nationalistarnir leikað í og garterað. Soleiðis var tá, og soleiðis var hesaferð. Tann bilsni, kanska ovfarni hjálparin fekk skuldina fyri hvat sum helst og alt tað illa.

Sjóvinnubankin – sum teir ósmædnir kallaðu Okkara Banka – er endurreistur ikki bert einaferð, men fimm ferðir hesi seinastu 50 árini. Í meðal 10. hvørt árið mátti hann hava hjálp frá danska statinum. Fyrsta kreppan var í 1951–52, tá hann fekk innsprænging tvær ferðir. Hetta burdi verið væl kent, annars man "Reyðabók" vera at fáa á bókasavninum. Tað hevði verið "pent" um loysingin hevði verid trumfað ígjøgnum av loysingaflokkinum Fólkaflokkinum stuðlaður av orðloysingaflokkinum Tjóðveldisflokkinum, og so 5 ár seinni var henda pinkurepublikk farin á heysin. Hvør skuldi tá hjálpt. Og við hvørjum treytum???

Minni kent er, at bankin eisini í 1956 var í neyð.

"Men (banken) løb ind i nye vanskeligheder i 1956 som følge af tab på store engagementer med hvalfangstselskaber. Efter opfordring af Viggo Kampmann blev krisen denne gang afværget i stilhed ved nationalbankens mellemkomst. Det var opfattelsen, at en 3. rekonstruktion ville skabe så megen turbulens omkring banken, at dens eksistens ville blive truet"(30)

Danskir pengar bjargaðu eisini Kjølbro
Longu aftur í 1962 átók Nationalbankin sær eina serliga "føroyska" uppgávu. Størsta vinnulívsfyritøka í Føroyn "J.F. Kjølbro" í Klaksvík var um at fara á heysin. Teir høvdu mist nógvar pengar uppá fiskiroyndir í Eysturgrønlandi.

"Nationalbanken trak sig siden ud af sit engagement ved at forære de aktier, so Nationalbanken var kommet i besiddelse af, til en fond med det formål at yde støtte til unge færingers erhvervsuddannelse." (30) Hetta var tann sonevndi Føroyagrunnurin.

Í 1974/75 var likviditetskreppa bæði í bankunum og í landskassanum. "Igen ydede Nationalbanken støtte, dels til bankerne direkte, dels ved genbelåning af Landsstyrets kreditter i bankerne." Og ikki óvæntað bleiv hjálpin av uppgjørdum, korkalittum tjóðveldismonnum uppfatað sum "kolonialur ágangur og hjálandapolitikkur", sum ein oddagrein í 14. skrivaði. Føroyar hava aldri síðan Grundlógina í 1848 verið uppfataðar sum koloni ella hjáland, men sum "norrøn bróðirtjóð", sum grundlógarmenninir málbóru seg.

Tað kundi verið nevnt í stuttum, men tað er kanska ein onnur søga, at føroyska vinnulívið og samfelagið eisini hava fingi ríkar møguleikar at læna ella fáa beinleiðis stuðul úr ymsum grunnum, sum skuldi gagna framburði í Føroyum. Marshallhjálp til Tjaldrið og SEV, Realkredittirin til endurnýggjan av skipaflotanum í 50–60-unum og frammá, Fiskaríbankin, Investeringsfonden for Færøerne, 60 milliónagrunnurin, Egnsudviklingsstøtte, Framtaksgrunnurin.

Fíggingargrunnurin fekk samfelagið á føtur aftur
Ikki minst Fíggingargrunnurin fra 1992, sum við næstan 3 milliardum bjargaði bankunum, var stór hjálp í neyðini. Og skera vit alt svass burtur, so virkaði hann sum ætlað: Sum ein hjálp at fáa føroyska samfelagið aftur á føtur. Hjálpin hevur verið sera effektiv. Samfelagið er komið undan kreppuni. Men hvør hevur havt mannshjarta til at siga takk fyri tað hjálp, sum varð givin í eini svárari stund? Eingin!! Allir hava teir verið við í dansinum um gullkálvin í 1980-unum. Og kanska teir skammast. So er best at skelda tað hjálpandi hondina, og venda øllum við og fáa tað til at tað var hjálparin, sum hevði alla skuld. At hjálparin konspirator og usurpator (samfelagsoyðari). Tað er hóast alt munur á frekleika og ósmædni. Orðloysingamenn bera prísin.

Semja var um partabrævabýtið
Tá Sjóvinnubankin varð endurreistur í tveimum umførum í 90-unum við almennum pengum, vóru kappingartreytirnar bankanna millum ikki javnar, soleiðis sum eg stutt nart við í fyrra parti. Føroya Banki hevði fingið hjálp úr Danske Bank, sum átti gott 60% av partabrøvunum har. Vert er at geva gætur, at Danske Bank ikki hevði nakra juridiska skyldu at hjálpa bankanum (dóttirfelagnum) í Føroyum. Hann kundi verið farin fallit, og so hevði tað ballið verið liðugt, men til sóran skaða fyri føroyska vinnulívið. Ýmisk uppskot og ymiskar loysnir vóru havdar á lofti, og hetta gav ikki tey stóru problemini, í fyrsta lagi heldur ikki millum føroyskar politikarar.

" Substansen var, at de to bankers aktier i kursmæssig henseende blev bragt på samme niveau, så man kunne bytte aktier stort set lige over i forholdet 1:1" (98) sigur Mikkelsen, og heldur fra á næstu síðu: "På daværende tidspunkt var de ydre økonomiske omstændigheder så flygtige, at det var vanskeligt at finde blot nogenlunde præcist og holdbart udtryk for bankernes aktuelle hensættelsesbehov og dermed for værdien af deres engagementer."

Sjálvt partabrævabýtið skuldi javnstilla bankarnar, soleiðis at báðir fingu ein part av almenna kapitalinum, sum var skotin inn. "Ved forslaget ville Fonden (Fíggingargrunnurin, har RM var formaður, RG) erhverve aktier i Føroya Banki svarende til 52 % af bankens aktiekapital, medens Fonden ved at betale med Sjóvinnubankaktier fik reduceret sin aktieandel i denne bank fra 94 % til 64 %. Den Danske Bank fik en aktiepost i begge banker på 30% af deres aktiekapital.... Det er dette grundlag, der siden fra færøsk side blev kritiseret som mangelfuldt."

Kunningarfundur í Keypmannahavn í mars 1993
Tað var fyrst í mars 1993 at uppskotið fær snið og verður góðkent, fyrst í Grunninum, so í Landsstýrinum og Stjórnini. Men fyri at Landsstýrið kundi kunna seg hjá Danske Bank um, hvat tað ætlaninin hjá bankanum var, so bleiv skipað fyri fundi í Keypmannahavn har Marita Petersen, Sundstein og Sigurd Poulsen, landsbankastjóri luttóku.

Sum fyrireiking til henda fund hevði Landsstýrið í skundi biðið Búskaparráðið um eina meting av støðuni. Ráðið vigaði fyri og ímóti, og gjørdi vart við, at teir ikki høvdu kannað hvussu stór tap kunnu væntast í bankunum. Men teir ráddu til at partabrævabýtið fór fram, so sum uppskotið var. Búskaparráðið hevði, meðan teir arbeiddu uppá hetta notatið, gjøgnum telefonina verið í sambandi við Finanstilsynet, fyri at kunna seg um støðuna í Føroya Banka.

Allir partar høvdu sostatt tosað saman, øll vistu um støðuna, øll vistu um vandarnar, um einki bleiv gjørt (mest at vandin var dyri at DB bakkaði heilt út)

Referatið hjá Sigurd Poulsen, sum lak út, tí tað var opportunt hjá nøkrum politikarum
Her koma vit so til tað ofta illa gitna fundarreferatið hjá Sigurdi, sum seinni - nógv seinni- kom at verða "prógvið" um tær illmeintu ætlanir, sum Stjórnin og Danske Bank høvdu.

Fyrst er at siga, at tað ógviliga óheppið at eitt referat lekur út frá einum ikki almennum fundi. Minnist meg rætt, er tað hondskriváða A-4 arki hjá Sigurdi lisið upp bæði í Løgtinginum av Birgiri Danielsen, í Sjónvarpinum og eisini endurgivið fotografiskt í Sosialinum, kanska eisini aðrastaðir. Eitt referat, sum enn ikki er góðkent av øllum fundarluttakarum, er juridiskt og politiskt einki vert. Einhvør kann skriva sítt egna referat. Tað er ikki ein referentur, sum eigur sannleikan, men tað sum partarnir í fundinum eru samdir um, tað kemur at standa í endaliga og góðkenda referatinum (fundarfrágreiðingini). Men hjá føroyskum politikarum og miðlamonnum bleiv hetta funnin fressur; hetta "prógvaði", at Danske Bank snýtti.

Annað er, at hesin lekin og tað hulduspæl, sum síðan tá fór fram á politiska vøllinum øðrumegin bendir á, at ansurin fyri proportiónum, hvat ið er stórt ella lítið, er rættiliga undirútviklaður í føroyskum politikki. Hinumegin er vissa fyri at bæði lekin í samráðingarnevndini og opportunistiska hulduspælið sum seinni tók seg upp, hevur minkað um trúvirði føroyskra politikara og embætismanna.

Spurningurin um Føroya Banki var solventur, hevði pengar í kassanum í mun til skyldurnar, verður viðgjørdur sera nágreiniliga av Richard Mikkelsen. Tað er vert at minnast, at í einari turbulentari periodu, har umstøðurnar broytast ógvuliga skjótt, er altið nógv óviss meting uppií. Støðan í dag kann vísa seg at vera ein heilt onnur í morgin.

Fleiri partar royndu at meta um støðuna, bankarnir sjálvir, Fíggingargrunnurin og Finanstilsynet. Nógv seinni kom so kanningarnevndin, Undersøgelseskommissionen, við sínum bakklókskapi og privatu granskoðarum, við sínum metingum. Men sum altíð er ólíka lættari at meta um fortíðina, um framtíðina eru nógvar myndir (scenariir) at taka støðu til.

Kanningarnevndin valdi eina meting framm um aðra
Men eitt hálvt ár aftaná partabrævabýtið er støðan í Føroyum versnað stórliga.

"Som resultat af Finanstilsynets inspektion blev Føroya Bankis hensættelser... fordoblet til 1,5 mia kr., medens Sjóvinnubankin fik sine hensættelser øget... til 1 mia. kr. Afskrivninger og hensættelser i de to banker kom herefter på niveau med hinanden... Hvorfor det pågældende revisionsfirma og dermed også kommisionen tog udgangspunkt i bankernes eget skøn frem for i Finanstilsynets vurderinger, står mig ikke klart. Derimod er det givet, at det spillede en væsentlig rolle for resultatet af den efterfølgende vurdering, om man gjorde det ene eller andet."(269; mín undirstriking,RG)

Hann ger enn eina ferð vart við hvussu óviss og broytilig støðan var. "Afskrivninger dækker over fordringer, der i regnskabsperioden er tabt. Hensættelser er en subjektiv størelse, der har til formål at give et retvisende billede af værdien af bankens udlånsengagementer ved regnskabsperiodens afslutning. Men netop i det subjektive element ligger et skøn, som det var vanskeligt at udøve med nogenlunde sikkerhed under de yderst labile (óstøðugu) forhold, der rådede på Færøerne i 1992/93..."

Sakin hevur nógvar smálutir, sum RM viðger út í æsir, eisini hvatið kanningarnevndin seinni kom fram til. Hann ger fleiri ferðir vart við, at niðurstøðurnar hjá kanningarnevndini eru ikki heilt eftirfarandi, til tíðir eru misskiljingar, eftir R. Mikkelsens meting.

"Banken var med andre ord – bedømt ud fra Tilsynets udsagn – solvent, da aktiebyttet blev indgået. Men dette var altså et udsagn, som vi efter Kommisionens senere bedømmelse ikke skulle have taget for pålydende" (273)

Landsstýrið visti fult út hvat teir tóku støðu til, og hvørjar kanningar vóru gjørdar og hvørjar ikki vóru gjørdar. RM vísir m.a. á, at Jógvan Sundstein "som spillede en central rolle under forhandlingerne om aktiebyttet, fremkom da heller ikke under disse forhandlinger med ønsker i denne retning" (274) Her meinast við ynskir um nakrar serligar kanningar um solvens oa. í eini kreppustøðu (due diligence).

Sjónvarp Føroya sum propagandasendari
Sjónvarpið eigur helst ein serligan leiklut í øsingini ella uppbyggingini av figgindabílætinum. Føroyingar vóru í grundini púra óskyldugir, men danskarar høvdu eina óndsinnaða ætlan, eina konspiratión, um at taka ræðið í Føroyum. Mikkelsen hevur eitt stutt kapitul um føroysku miðlarnar, har hann hevur fylgt væl við. Ikki er sørt at han er bilsin um, hvat ið har fór fram

"Kun en enkelt gang følte jeg, at den danske indsats og min egen rolle blev forvansket på en yderst ubehagelig måde. Dette skete i en udsendelse i det færøske fjernsyn 26.10.93. Udsendelsen, der i alt væsentligt drejede sig om aktiebyttet, var forkert og misvisende på afgørende punkter og kunne i mine øjne kun tjene det ene formål, at tilsværte Danmark og de danskere, der... var blevet involveret i denne sag." (145) Henda sending endaði við orðunum sum RM endurgevur soleiðis: "Var aftalen (um partabrævabýtið) nødvendig, eller var der tale om uduelighed af værste slags - eller var der tale om snyd og bedrag?"

Tíverri hoppaði Sosialurin eisini uppá vognin, og skrivaði dagin eftir í eini oddagrein, at henda sjónvarpssending átti at fáa politiskar fylgjur og sendingin tænti Sjónvarpi Føroya og føroyskum tíðindamonnum til miklan heiður og sóma. Tað er at vóna at blaðstjórin hevur sissað seg, men enn liggur henda sama illgitingin í luftini: teir snýttu okkum.

"For os, derkendte de danske motiver og hensigter indefra, forekom udsendelsen enormt fordrejet og i virkeligheden at være et medieflop af de helt store." Tað komu fleiri sokallaðar dokumentarsendingar av hesum slag, sum RM meinar "bidrog til tegningen af et fjendebillede af Danmark, der kom til at præge holdningen i vide kredse i det færøske samfund"(147)

Miðlarnir áttu at verið 4. statsmaktin, men...
Tað er ein vandi í einum lítlum samfelagi, at pressan er veik. Í hesum føri satsaði SvF uppá at dekka bankamálið, og brúkti nógva orku og pengar uppá tað. (Kanska so nógvar, at ein landsstýrismaður seinni noyddist at veita SvF eykahjálp).

Hinir miðlarnir vóru ikki mentir at hava eina kritiska viðgerð av tí, sum SvF sendi út sum "sannleikar" og "prógv". Tað var lættari at lofta sensatiónini og brygga viðari upp hesa mynd av bankasakini og kreppuni, sum føroyingar flestir nú hildu vera sannleika. Tí teir høvdu fingi hesar "avdúkingar" og "sannleikar" í høvdið so ofta, at tað hevði skorað seg fast.

Men hvat skulu fólk trúgva, annað enn tað sum pressan og miðlarnir servera. Støðan verður hættislig, um sjónvarpið verður ein propagandasendari.

Kapitlið um føroysku miðlarnar endar so:

"Udsendelsens leder, programmedarbejder Høgni Hoydal, fik efterfølgende en hurtig karriere i færøsk politik som repræsentant for der republikanske Parti. Efter valget til lagtinget i 1998 blev han vicelagmand med spørgsmålet om selvstyre som sit område"

Nú siggi eg í bløðunum, at hesin sami maður hevur skrivað eina sera fantasifulla grein um Richard Mikkelsen. Men tað má eg so taka upp í tríðja umfari.

Haldið mær til góðar.